Rani Nolsøe, stjóri á Klaksvíkar Havn:

# Scania leggur trýst á vestaru bryggju

**– Tað vildi verið løgið, um vestara síða ikki merkir eina stóra broyting í ferðsluni á kaiini, nú Scania er farin at røkja siglingina um Leirvíksfjørð, sigur Rani Nolsøe**



*Tað er ein munandi øking í ferðsluni á vestaru bryggju í Klaksvík, síðani Scania byrjaði at sigla*

LEIRVÍKS-FJARÐARLEIÐIN
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Rani sigur, at ársfrágreiðingin hjá Strandferðsluni vísir, at Dúgvan í ár 2000 flutti 75.374 akfør og 202.598 ferðafólk um Leirvíksfjørð.

- So tað vildi verið undarligt, um tað ikki sást aftur í økingini í ferðsluni á vestaru bryggju, heldur hann.

Hann sigur, at arbeiðsfriðurin er órógvaður, orsakað av bilarøðini til Scaniu, men tað er so bert, meðan Scania liggur í Klaksvík.

Til dømis lá Næraberg á Klaksvík og landaði og menn vóru bangnir fyri, at tann nógva ferðslan fór at tarna arbeiðinum so mikið, at hann ikki fór at verða liðugur til tíðina. Men tað bilti ikki.

Eisini hevur Skipafelagið sítt arbeiði har á keiini. Og av tí at, bingjuplássið hjá teimum er longri úti á keiini, skal tann stóri trukkurin hjá teimum koyra í millum, meðan teir lossa og avskipa.

– Tað er ein trupulleiki, tí bilarøðin stutt sagt blokerar, sigur Rani Nolsøe.

Hann leggur tó aftur at, at hóast alt, so hevur arbeiðið gingið nógv betur enn væntað.

Rani Nolsøe sigur eisini, at tey fingu boðini um at Scania skuldi sigla í seinna lagi. Og tað tískil skapti óneyðugar trupulleikar.

– Vit hava ikki upplivað hetta sum ein mansskapstrupulleika hjá Strandferðsluni, men heldur sum eina lítla slagsíðu á managementsíðuni hjá teimum, sigur Rani Nolsø.

– Vit hava havt eitt gott samstarv við manningina umborð á Scaniu, so tað er í hesum førinum í fyrireikingunum, at trupulleikarnir liggja og ikki í tí praktiska dagliga arbeiðinum.

– Hóast tað, at vit vita, at Dúgvan skal til árligt eftirlit, og at tað er torført at fáa annað skip í hennara stað, so hevði tað verið gott at fingið longri fyrireikingartíð til slíkt, leggur Rani Nolsø afturat.

## Ferðsluóhapp í Klaksvík

**Ein 16 ára gamal drongur á knallert kom til skaða, tá hann týsdagin rendi saman við einum bili á Nólsoyar Pálsgøtu**

FERÐSLUÓHAPP
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Drongurin, sum gongur í 10. flokki, hevur seinastu vikuna verið í starvsvenjing á Bedingini. Týsdagin eftir arbeiðstíð setti hann seg so á knallert sína, og skuldi fara til hús.

Meðan drongurin á knallertini koyrir heim eftir Nólsoyar Pálsgøtu, kemur ein bilur koyrandi norður eftir á somu gøtu. Hesin bilurin ætlar sær inn í Statoil, men sær ikki drongin á knallertuni koma ímóti sær.

Bilurin snarar tískil yvir um vegin inn á økið hjá Statoil, beint sum drongurin kemur koyrandi á sama vegastrekkið.

Drongurin koyrdi í so skjótt, og fekk sostatt ikki tíð til at steðga í nóg góðari tíð. Hann royndi at snara undan bilinum, men hetta eydnaðist tíanverri ikki.

Bilurin og knallertin bóru við hvønn annan, og stoyturin førdi við sær, at drongurin datt av knallertini, sum síðani koppaði yvir 16 ára gamla drongin.

Tveir sjúkrabilar vóru skjótir á staðið, men tíanbetur var skaðin ikki so stórur, sum hann annars lættliga kundi verið.

Drongurin var eftir óhappið fluttur á sjúkrahúsið í Klaksvík, og staðfest varð, at hann hevði brotið fótliðin í trimum støðum. Einki hendi við bilføraranum.

Eingin stórvegis skaði kom á hvørki bilin ella knallertina.

## Herverk í Kunoyartunlinum



**Seinasta vikuskiftið hava óargaungar aftur verið uppá spæl í Kunoyartunlinum, har teir hava oyðilagt 53 av skeltunum, sum vísa á vegkantin inni í sjálvum tunlinum**

HERVERK
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Kunoy:** Mánamorgunin fekk løgreglan í Klaksvík eina fráboðan um, at herverk enn eina ferð var framt inni í Kunoyartunlinum.

Á páskum fingu teir eisini eina fráboðan um herverk í tunlinum, men hesu ferð vóru heili 53 skilti, sum vísa á vegkantin, krúllaði saman og oyðiløgd.

– Harafturat hava allir prestarnir, sum standa við vegin millum Ánirnar og Strond, fingið av at vita. Ein bilur hevur rent á teir allar, so teir allir sum ein liggja brotnir við vegkantin, sigur vakthavandi á politistøðini í Klaksvík.

Fleiri fólk hava í vikuni ringt inn á politistøðina, og gjørt vart við hendan trupulleika, og tey flestu eru á einum máli um, at hetta er ein stór skomm.

– Serliga inni í Kunoyartunlinum sær hetta ræðuligt út. Har er einki skelti, sum kann vísa bilkoyrarum, hvar vegkanturin er, og tað ávirkar sjálvandi eisini trygdina. Ein skuldi hildið, at vit eru farin 50 ár aftur í tíðina, siga tey av politistøðini.

Á politistøðini arbeiða tey í løtuni við fullum álvara víðari við málinum.



# Línubátarnir innaftur seinni í vikuni



*Mánadagin og týsdagin var eingin landing á Kósini, men virkið hevur keypt upsa og tosk á uppboðssølu. Væntandi landar onkur línubátur á Kósini seinni í hesi vikuni*

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

At fiska við troli og línu er hvør sítt. Trolararnir verða stundum tarnaðir av veðri, men ikki av streymi sum so. Hinvegin kunnu bæði veður og streymur tarna línubátunum at fiska.

Er streymurin so harður, at ikki er roynandi, liggja línuskipini, og tá fara tey ofta útaftur í senni.

Og soleiðis var tað í síðstu viku.

Nú hava línuskipini so roynt í eina góða viku, og tíðin fer at vera komin, tá ið tey koma innaftur at landa.

### Kósin keypir á uppboðssølu

Adrian Dalsá, stjóri á Kósini, sigur, at tey vænta onkran av línubátunum seinni í hesi vikuni.

Mánadagin og týsdagin var eingin landing á Kósini, men virkið hevur keypt upsa og tosk á uppboðssølu.

- Nógvur fiskur er á marknaðinum, og vit arbeiða hvønn dag, hóast eingin landing beinleiðis er til virkið. Men nú vænta vit so onkran av línubátunum ein av fyrstu døgunum, sigur stjórin á Kósini.

## Nóg mikið er av kørum og kassum

**- Fiskiskapurin hevur verið rættiliga góður í vár, og tí hevur verið brúk fyri nógvum íløtum, bæði kørum og kassum, sigur Kári í Garði, stjóri á Kassamiðstøðini.**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

- Skuldi Smyril altíð verið nóg stórur, hevði hann verið ógvuliga stórur.

Soleiðis tekur Kári í Garði, stjóri á Kassamiðstøðini, til, tá ið vit spyrja hann, um nóg mikið er av kørum og kassum í landinum.

Í grein í Sosialinum herfyri kom fram, at fiskivinnuni, bæði á sjógvi og landi, vantar kør og kassar. Á Fiskamarknaði Føroya søgdu tey, at marknaðurin hevur verið noyddur at siga skipum frá sær, tí ov fá kør og kassar eru til fiskin, sum kemur inn á gólvið. Eisini kom fram, at skip, sum hava landað, stundum hava bíðað leingi eftir kørum, og tí hevur landingin drigið út. Í ringasta føri eru skipini ikki sloppin útaftur beinanvegin, tí ov fáir kassar eru at koyra umborð. At enda kom ein ábending um, at virkir leggja inn undir seg, og tað ger, at trupulleikin gerst uppaftur størri.

### Nóg mikið av íløtum

Kári í Garði sigur, at nýtslan av kassum er í mun til fiskiskapin, men hann heldur ikki, at ov lítið er av íløtum í landinum.



*Kári í Garði, stjóri á Kassamiðstøðini, metir ikki, at ov lítið er av íløtum í landinum*

- Fiskiskapurin hevur verið rættiliga góður í vár, og tí hevur eisini verið brúk fyri nógvum íløtum, bæði kørum og kassum.

Hann viðgongur, at tað hevur verið eitt sindur torført í vár at nøktað tann stóra tørvin, ið verið hevur, men heldur ikki, at orsøkin er, at ov fá íløt eru í landinum.

Spurdur, um teir, sum framleiða kassarnar, ið Kassamiðstøðin keypir, megna at levera tað, sum biðið verður um, sigur Kári:

- Hava vit eina bílegging av íløtum í vár, so fáa vit tað, sum biðið verður um, sigur stjórin á Kassamiðstøðini, sum annars harmast um, at tey, sum hava trupulleikarnar, ikki venda sær til Kassamiðstøðina heldur enn fjølmiðlarnar.

## Eysturbúgvin og Vesturbúgvin rimmar túr

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Tað er ikki smávegis túrur, Eysturbúgvin og Vesturbúgvin hava gjørt.

Eysturbúgvin, sum partrolar við Vesturbúgvanum, var á Sandi mánamorgunin. Skipið var fult undir lúkurnar og meira enn tað. Tað síðsta, teir fingu, høvdu teir á dekkinum.

Jóan Petur Vest á Sandoy Seafood sigur, at Eysturbúgvin hevði stívliga 300.000 pund, meginparturin upsi. Teir royndu í 5 dagar. Mett verður, at veiðan hjá Vesturbúgvanum er á leið tann sama sum hjá Eysturbúgvanum.

Spurdur, hvussu upsin er til støddar, sigur Jóan Petur, at meginparturin avveiðini er upsi 3, og tað er av tí fræga, tí summar túrar hevur stórur partur verið upsi 4.

Á Sandi vænta tey Nornagest og Kolumbus seinni í vikuni. Teir hava roynt í eina viku ella so.

Bæði á virkinum á Sandi og í Skopun hava tey ríkiligt at gera í løtuni.

Nakað av útróðrarfiski kemur eisini uppá land á Sandi, tá ið tað viðrar, men sum skilst, er fiskiskapurin ikki nakað serligur.

Onkur bátur við snellu er seinastu dagarnar farin um tey túsund pundini.